# Var ikki av flogfarinum

Brasilsk skip, sum hava leitað síðani í gjár, hava framvegis ikki funnið nakað, sum stavar frá fraqnska flogfarinum -Enn hava vit ikki funnið nakað, sum stavar frá Air France-flogfarinum, sigur talsmaðurin hjá brasilsku myndugleikunum. Hildið verður, at tað franska flogfarið datt niður í havið einar 550 fjórðingar úr brasilsku norðurstrondini, og flogfør hava sæð vrakpetti har á leiðini. Men einki av tí, sum tey brasilsku skipini hava tikið upp av sjónum, er frá franska flogfarinum, siga myndugleikarnir. Talan er um burturkast frá skipum, og brasilsku myndugleikarnir halda eisini, at oljubletturin, sum varð sæddur fyrr í vikuni, stavaði frá einum skipi.



# Norðurkorea vil tingast

Stjórnin í Norðurkorea hevur nú skotið upp, at norðurkoreanskir og suðurkoreanskir embætismenn skulu hittast í næstu viku at umrøða viðurskiftini millum tey bæði grannalondini. Tíðindini um fundin koma eitt sindur óæntað, tí støðan millum tey bæði koreonsku londini hevur verið spent, síðani Norðurkorea royndi eina kjarnorkubumbu og fleiri rakettir fyri fjúrtan døgum síðani. Sum skilst vil Norðurkorea tosað við Suðurkorea um eitt stórt vinnuøki, sum er í Norðurkorea, men sum suðurkoreanskar fyritøkur reka.

# Gunvør skal selja Reyða Kross

**Fyrrverandi fyrsti lærarin í Nólsoy, Gunvør Joensen, er settur nýggjur samskipari í haldinum hjá Reyða Krossi. Fyrsta tiltakið verður ein loppumarknaður í morgin**

REYÐI KROSSUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Handilin hjá Reyða Krossi hevur nú í eina tíð ligið stillur, tí eingin leiðari hevur verið, eftir at tann undanfarni segði hesa ábyrgdina frá sær. Samstundis góvust tær allarflestu sjálvbodnu krambakvinnurnar soleiðis, at sølan úr handlinum á Bryggjubakka steðgaði. Men nú skal so gongd koma á aftur.

Formaðurin í Reyða Krossi Føroya, Súni Vinther, hevur í eina tíð hugt seg um eftir einum nýggjum leiðara at standa fyri handlinum hjá felagsskapinum, og fyri góðum mánaði síðani gjørdi hann so av at heita á Gunvør Joensen úr Nólsoy, um at taka hesa ábyrgdina á seg.

Gunvør bað um umhugsingartíð, og á fundi við leiðsluna á Reyða Krossi fyri umleið 14 døgum síðani játtaði hon so, at átaka sær hetta arbeiðið, sum er sjálvboðið.

Hesa tíðina síðani tá hevur Gunvør Joensen nýtt at seta seg inn í starvið, og at royna at útvega sjálvbodna arbeiðsmegi at røkja handilin á miðhæddini á Brygjubakka.

- Enn eru vit ikki so nógvar sjálvbodnar, so enn er ikki greitt, hvussu handilin verður opin. Men hann verður so opin so ofta, sum orkan røkkur til, sigur Gunvør Joensen.

Tað er bert handilin á miðhæddini, sum tørvar fólk. Bókasølan í Vágsbotni passar seg sjálva.




*Gunvør Joensen, nýggi handils samskiparin, og Súni Vinther, leiðari fyri Rewyða Krossi Føroya, framman fyri hølunum hjá felagsskapinum á Bryggjubakka*

*Mynd: Leo Poulsen*

### Leiðararoyndir

Tað er ikki meiri enn smá tvey ár síðani, at Gunvør Joensen legði frá sær sum fyrsti lærari við Nólsoyar skúla, eftir at hava stýrt skúlanum í eitt langt áramál. So leiðsluroyndirnar eru avgjørt til staðar.

- Mítt starv verður at samskipa søluna hjá Reyða Krossi. Fyrsta dagin fari eg at hava fund við tey, sum hava bjóða seg fram sum sjálvbodna hjálp, fyri at finna út av, hvussu ofta og hvussu leingi og nær tey hava møguleika at standa í handlinum. Samstundis haldi eg fram við at leita eftir meiri sjálvbodnari arbeiðsmegi, so handilin kann hava opið so títt og støðugt, sum tilber, sigur Gunvør Joensen.

Fyrsta tiltakið við Gunvør Joensen sum leiðara verður nú í morgin, tá Reyði Krossur skipar fyri loppumarknaði framman fyri bókasøluni hjá felagsskapinum í Vágsbotni. Samstundis verður handilin á fyrstu hædd eisini opin. Loppumarknaðurin verður frá klokkan 10 til klokkan 15.

- Í viku 26 fáa vit vitjan frá donskum ráðgeva, sum skal hava fund við leiðsluna og meg, umframt at hann – ella hon – eisini skal leggja sjálvbodnu arbeiðsmegini lag á og geva góð ráð, sigur Gunvør Joensen.

Sum omanfyri nevnt manglar Reyða Krossi sjálvbodna arbeiðsmegi at standa í handlinum, og hevur onkur hug at hjálpa til – um tað so bert er ein seinnapart um mánaðin – so er bara at seta seg í samband við Reyða Kross ella Gunvør Joensen, skulu vit heilsa og siga.




*Hølini í Steinatúni verða ikki bygd um til matvøruhandil*

# Óvist við Steinatúni

Kioskin í Steinatúni letur møguliga aftur – í hvussu er í eina tíð. Verandi leigarar hava søkt býráðið um loyvi at víðari leiga hølini, sum frameftir ætlandi eisini skulu selja matvørur.

Men skal tað lata seg gera, krevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan umfatandi broytingar og umbyggingar, og tað verður neyvan gjørt.

– Tað er neyvan hugsandi, at kommunan fer at gera neyðugu broytingarnar, so matvørur eisini kunnu seljast í Steinatúni. Tað verður alt ov kostnaðarmikið, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hann váttar, at umsøkt um víðarileigu og loyvi at selja matvørur er komin inn til kommununa.

– Eg haldi, eg tori at siga viðvissu, at nevnda umbygging ikki verður framd, so ynskja verandi leigarar ikki at halda fram við kiosk, verður alternativið at onkur annar fær møguleikan at leiga hølini, tí tað er ynskiligt, at ein kiosk er í hølunum, sigur Heðin Mortensen.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum eigur hølini í Steinatúni, har kioskin heldur til.

**(leo)**

# Vil hava fólk til Kambidia

**Reyði Krossur Føroya søkir í hesum døgum eftir einum føroyingi at hjálpa til við einari heilsumenningarskrá í Kambodia**

REYÐI KROSSUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Reyði Krossur Danmark hevur síðani 2003 stuðlað Reyða Krossi í Kambodia at seta í verk eina samfelags grundaða heilsumenningarskrá í fjarskotnum økjum í Kambodia. Talan er um eina langtíðar ætlan, sum røkkur fram til 2011, tá hon endar.

Síðani tíðliga í 2009 hevur Reyði Krossur Føroya – við dyggari fíggjarligari hjálp frá Uttanríkismálaráðnum – stuðla einum av fjarskotnastu og fátækastu økjunum í Kambodia, Rattanakiri provinsini. Hetta økið liggur í landnyrðingspartinnum av landinum við markið til Laos og Vietnam.

Uttanríkismálaráðið stuðlar verkætlanini í eitt ár við møguleika at leingja stuðulin í upp til tvey ár aftrat, tað vil siga heilt fram til verkætlanin endar.

Reyði Krossur Danmark søkir í hesum døgum – gjøgnum Reyða Kross Føroya – eftir einum føroyingi at hjálpa lokalu greinini av Reyða Krossi í Kambodia í Rattanakiri provinsini í tveir mánaðir, galdandi frá 15. august til 15 oktober 2009. Tann, ið fær starvið, má verða til reiðar, saman við Reyða Krossi Føroya, at upplýsa um arbeiðið, tá viðkomandi kemur aftur til Førya eftir tveir mánaða starv í Kambodia.

Starvið fevnir millum annað um at veita tekniska hjálp at seta í verk og hava eftirlit við heilsumenningarskránni í provinsini, menna heilsu-, føði- og saniter hjálpartól saman við starvsfólki á staðnum, skipa fyri venjing og workshops um sama evni umframt annað viðkomandi arbeiði.

Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving so sum lækni, jarðamóðir, sjúkrarøktarfrøðingur, lærari ella líknandi, og sjálvandi er neyðugt at duga enskt.

Lýsingarnar eru at síggja í miðlunum í hesum døgum, sigur Reyði Krossur Føroya.